

Siv Jensen. Mynd: Alexander Helberg

# Oljubremsan ger at Noreg brúkar meir enn tað sum kemur inn

**Jógvan Hugo Gardar**

07.10.2015 - 18:02

Oljan.fo

Siv Jensen verður tann fyrsti norski fíggjarmálaráðharrin sum kemur at brúka meir oljupengar enn tað hon sparir. Tað merkir at á fyrsta sinni skal norska stjórnin í 2016 ikki spara meir í oljugrunninum.

Í morgun legði Siv Jensen fram sítt fíggjarlógaruppskot fyri 2016. Samstundis sum oljuinntøkurnar minka munandi, og harvið inntøkurnar til norska landskassan, so lovar Siv Jensen at geva norðmonnum skattalættar i 2016.

Úrslitið er at sum støðan er, so gerst 2015 seinasta árið at norðmenn spara pengar í sokallaða oljugrunninum, ið skal tryggja komandi ættarlið eina vælferð. Grunnurin er ein av heimsins ríkastu grunnum, og har vóru knappar 6900 milliardir norskar krónur í juni. Hetta merkir at hvør einasti norski ríkisborgarin eigur 1,35 milliónir krónur í grunninum.

Grunnurin bleiv í síni tíð stovnaður fyri at tryggja norska búskapinum móti sveiggjunum í oljuprísinum. Hetta merkir einfalt at tá yvirskot er i lankassarokniskapinum, so skal yvirskotið flytast í grunnin, meðan stjórnin kann taka pengar úr grunninum tá undirskot er.

Í 2016 roknar norska stjórnin við at tjena 204 milliardir nprskar krónnur, meðan landskassin kemur at brúka 207,8 milliardir í "oljupengum". Tað ger at landskassin má í Oljugrunnin eftir milliardunum sum mangla í.

E24 skrivar at í 2013 flutti táverandi fíggjarmálaráðharrin, Sigbjørn Johnsen, 227,9 milliardir krónur í Oljugrunnin. Í 2014 flutti Siv Jensen 155,5 milliardir krónur í grunnin. Í 2016 gerst Siv Jensen so tann fyrsti fíggjarmálaráðharrin sum tekur pengar úr grunninum, í staðin fyri at koyra pengar í grunnin.